## Ósamd við pávan



Flestu italiumenn eru ósamdir við Benedikt páva, sum á vitjan síni í Afrika nú um dagarnar mælti fólki frá at brúka hít, tí hítin økir vandan fyri, at fólk kunnu fáa eyðkvæmi. Ein meiningakanning, sum blaðið La Republica hevur latið gera, vísir, at 52,3 prosent av italska fólkinum eru fullkomiliga ósamd við pávan. Kortini siga 54 prosent, at tey hava álit á honum sum páva. Hóast Vatikanið hevur stóra ávirkan á tað katólska Italia, hevur landið næstan evropeiskt met í fosturtøkum. Hinvegin eru lutfalsliga fáir hjúnarskilnaðir í Italia.

## Kajak til Avsralia

Í gjár var serligt minningarhald í tí kenda operahúsinum í Sidney í Avstralia, har fólk mintust danska arkitektin Jørn Utzon, sum doyði í fjør. Tað var hann, sum teknaði operahúsið, sum er kent um allan heim. Tey bæði børnini hjá arkitektinum, Lin og Jan Utzon, vóru við til minningarhaldið. Umboð fyri avstralska upprunafólkið, the Aboriginals, vóru eisini boðin við, og undir minningarhaldinum handaði Lin Utzon teimum eitt modell av einari grønlendskari kajak, skrivar heimasíðan hjá KNR.

266-b spøkir aftur:

# Annika lumpaði Jógvan

**Tað leikar so hart á í Fólkaflokkinum, at Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður, nú hóttir við at rýma úr samgonguni undan partakvinnuni, Anniku Olsen. Eg ætli ikki at lata meg lumpa einaferð afturat, sigur hann**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg ætli ikki at lata meg lumpa einaferð afturat.

Jógvan á Lakjuni, løgtingsmaður úr Fólkaflokkinum, er so misnøgdur við framferðina hjá partakvinnuni, Anniku Olsen, at hann nú beinleiðis hóttir við at rýma úr samgonguni undan henni.

Tað er tann tiltikna og illa umstrídda grein 266-b í revsilógini, sum spøkir aftur.

> Eg bað um, at hetta málið ikki fór í tingið. Vissi tingið ætlar at koyra hetta ígjøgnum, verður tað ikki við mær sum samgongulimi. Tað er bara tað, eg vil gera púra greitt
> *Jógvan á Lakjuni á Føroya Løgtingi 25.3. mars, 2009*



*Jógvan á Lakjuni vil ikki verða rukka einaferð afturat og tí hevur hann kravt, at partakvinna hansara í landsstýrinm, Annika Olsen, tekur uppskotið aftur um at broyta revsilógina*

Vegna samgonguna hevur Annika Olsen, landsstýriskvinna fyri Fólkaflokkin lagt uppskot fyri Løgtingið um at gera fleiri broytingar í revsilógini og í hesum sambandi skal eisini onkur broyting gerast í grein 266.

Jógvan á Lakjuni, sum eisini er limur í samgonguni, er so misnøgdur við framferðina hjá partakvinnuni, at bakkar hon ikki, hevur hann givið henni knívin á barkan og hóttir við at rýma úr samgonguni.

### Bað hana lata vera

Hann sigur, at trupulleikin er, at er ikki nóg væl kunnaður um málið.

- Vit fingu ikki høvi til at síggja málið, áðrenn tað varð lagt fyri Løgtingið og eg bað landsstýriskvinnuna bíða við málinum, til vit øll vóru kunnað.

- Men hon lurtaði ikki eftir og legði tað fyri Løgtingið kortini og tað irriterar meg, segði hann.

Tað var ikki fyrrenn eftir at málið varð framlagt, at kunnandi fundur var fyri tingfólkið um broytingarnar

### Undir ongum umstøðum

Hann sigur, at í fyrstu syftu er tað greinin 266-b, sum hann stúrir fyri.

Í grein 266-b er ætlanin at skoyta upp í, at revsingin skal herðast, tá ið mismunur verður gjørdur á fólki sum liður í propagandavirksemi.

- Eg veit ikki, hvat hetta merkir. Eg veit ikki um ein prædikumaður, ið tosar ímóti samkyndum, kemur undir hesa ásetingina.

Jógvan á Lakjuni sigur, at møguliga eru aðrar staðfestingar í lógini, sum Annika Olsen hevur lagt fyri Løgtingið, sum hann ikki kann taka undir við.

> Vissi hetta málið ikki verður tikið aftur, so eri eg slettis ikki við í samgonguni meir
> *Jógvan á Lakjuni á Føroya Løgtingi 25.3. mars, 2009*

- Men tað veit eg ikki beint nú, tí eg havi ikki havt høvi at kanna málið út í æsir, sigur løgtingsmaðurin fyri Fólkaflokkin.

Tað, sum serliga leypir órógv á Jógvan á Lakjuni, er kortini tað, at hann veit ikki, hvussu atkvøðast skal í málinum.

- Summir løgfrøðingar siga, at atkvøðast skal fyri allari lógini, sum hon er. Er tað støðan, skulu vit atkvøða um alla lógina og sostatt koma vit eisini at atkvøða fyri allari grein 266-b, sum elvdi til so djúpa gjógv í Løgtinginum fyri nøkrum fáum árum síðani.

Og tað vil Jógvan á Lakjuni undir ongum umstøðum verða við til.

- Eg vil undir ongum umstøðum koma í ta støðu, at eg skal atkvøða fyri grein 266-b í revsilógini.

### Ikki lumpast einferð afturat

Tí hevur hann kravt, at Annika Olsen tekur málið aftur.

- Tað verður ikki við mær í samgongu, at Løgtingið viðgerð og samtykkir hetta uppskotið, sum tað nú fyriliggur.

- Tí skal Annika Olsen taka uppskotið aftur, so at vit fáa viðgjørt tað í samgonguni og so at vit kunnu leggja gera tær broytingar, sum vit eru samd um.

Hann vil ikki góðtaka, at málið kemur til viðgerar, tí so veit ongin, hvat tað kann enda við.

- Eg lati meg ikki lumpa einaferð afturat. Eg læt meg lumpa fyrru ferð grein 266-b var til viðgerar í Løgtinginum. Tá vóru ongi útlit fyri í fyrstuni, at tað fór at verða samtykt. Men sum øllum kunnugt bleiv tað samtykt.

Og tað varð enntá við mær í samgonguni og tað skal ikki endurtaka seg, staðfestir løgtingsmaðurin.

Tí geri hann púra greitt, at verður uppskotið ikki aftur, fer hann úr samgonguni og tekur allan stuðulin til samgonguna aftur.

Hann leggur afturat, at løgtingið kann viðgera og samtykkja, tað, sum tingið vil. Tingið kann eisini viðgera og samtykkja hetta málið.

- Tað verður bara ikki við mær í samgonguni og kann eg ikki vera í samgonguni í hesum máli, kann eg heldur ikki vera við í samgonguni í nøkrum øðrum máli.

> Lóg nr. 309 frá 17. mai 1995 "Racediskrimination". Lógin ásetur, at tað eru herdar umstøður, tá ið racediskriminasjón verður framd sum liður í propagandavirksemi
> *Tað er hetta brotið í uppskotinum, sum Annika Olsen hevur lagt fyri Løgtingið, sum Jógvan á Lakjuni undir ongum umstøðum vil góðtaka*

> Eg ætli mær ikki at verða rukka einaferð afturat í sambandi við grein 266-b
> *Jógvan á Lakjuni á Føroya Løgtingi 25.3. mars, 2009*

# Annika gevur Løgtinginum vælsignilsi til at kuta

**Annika Olsen hevur ikki gingið kravinum frá Jógvan á Lakjuni á møti, men hon gevur Løgtinginum loyvi til at kuta sum tað vil**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Annika Olsen vildi ikki ganga kravinum frá partamanninum, Jógvan á Lakjuni, á møti í gjárkvøldið, sjálvt um hann hóttir við at rýma úr samgonguni.

Sostatt vildi hon ikki taka uppskotið um broytingar í revsilógini aftur, sum Jógvan á Lakjuni kravdi og sum vit greiða frá í greinini omanfyri.

Men afturfyri gav hon Løgtinginum vælsignilsi til at kuta allar tær broytingarnar burtur, sum semja ikki kann fáast um.

Hon vísti eisini aftur, at hetta hevur nakað sum helst við tey samkyndu at gera, tí tað er longu samtykt og stendur ikki til at vika.

Tað, sum hetta snýr seg um, er at seta eitt stykki afturat upp í lógina um at herða revsingina fyri diskriminatión, sum verður framd sum liður í propagandavirksemi.

- Tað, sum liggur í propagandavirksemi er áhaldandi álop á ein ávísan bólk í samfelagnum ígjøgnum longri tíð.

-Tað kann einsvæl verða átrúnaðarligum bólki, ella ímóti jødum, legði hon afturat í Løgtinginum í gjár kvøldið

